**Semja millum**
**Maskinmeistarafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið 2015**

**Løn**

| | | |
|---|---|---|
| Lønin hækkar 1. okt. 2015 | 1,03 % |
| Lønin hækkar 1. okt. 2016 | 1,9 % |

**§ 4**

Tann 1. oktober 2015 rindar SEV/IRF 15 % í eftirløn.

**Dagføring av § 4 um eftirløn:**
Stk. 1: IRF og SEV rinda vegna starvsfólkið, til eina eftirlønarskipan, ið Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Maskinmeistarafelagið kunnu góðkenna, í eftirlønargjaldið 15 % av tí til eina og hvørja tíð galdandi mánaðarløn eftir lønartalvuni.
Stk. 2: Eftirløn verður ikki goldin av úrtíðarlønum, frítíðarískoyti, viðbótum, vaktargjøldum v.m.

**§ 6**

**Eykagjøld:**
Vaktargjald 1: 18 % av tímalønini í 3 lønarflokki á 1. stigi.
Vaktargjald 2: 36 % av tímalønini í 3 lønarflokki á 1. stigi.
Vaktargjald 3: 11 % av tímalønini í 3 lønarflokki á 1. stigi.

Stk. 5. Tann 1. oktober 2015 hækkar tímatalið úr 2 tímum upp í 3.

**§ 10**

Stk. 2. Maskinmeistari, sum heldur frí við løn, verður veittur frítíðarpeningur, sum er 1½ % av føstu árslønini og 12 % av útgoldnari úrtíðarløn.

**§ 13**

Fylgjandi ásetingar verða settar afturat verandi ásetingum í § 13:

Til álitisfólk kann bara veljast tann, sum hevur fulltíðarstarv og hevur arbeitt á viðkomandi arbeiðsplássi í minsta lagi 1 ár.

Álitisfólk hevur rætt og skyldu til at tingast við leiðsluna á arbeiðsplássinum, um mál sum stinga seg upp. Er álitisfólkið ikki nøgt við avgerðina hjá leiðsluni, skal álitisfólkið leggja málið fyri felagið.

Álitisfólkið hevur skyldu til at ansa eftir, at lógir, sáttmálar, fyriskipanir v.m., ið eru galdandi fyri arbeiðsplássið sum heild, verða yvirhildin, og skal virka fyri best møguligum samarbeiði limanna og leiðslunnar millum.

**§ 20**

**Í § 20 um uppsøgn verður stk. 6. orðað soleiðis:**
Verður maskinmeistari sagdur at fara úr starvi, og er orsøkin eftir Maskinmeistarafelagsins metan ógrundað, tá eiga KAF og Maskinmeistarafelagið at taka málið til viðgerðar sínámillum.

**§ 22** Maskinmeistarar í leiðandi størvum hava ikki rætt til at leggja arbeiðið niður í samband við møguligar arbeiðsósemjur, verkføll o. l.
Hetta er galdandi fyri:
Deildarstjóran á framleiðsludeildini
Verkmeistaran og varaverkmeistaran á Sundi
Verkmeistaran á Fossáverkinum
Verkmeistaran á Strond
Verkmeistaran Vágsverkinum

**§ 2** **Dagføring av flokkingum:**
Størv flokkað eftir lønartalvuni hjá Tænastumannafelag Føroya:
Varaverkmeistarin á Sundi 35.1

**§ 3** § 3 verður strikað og eftirfylgjandi greinar verða rættaðar samsvarandi.

Sáttmáli og lønartalva verða dagførd sambært omanfyristandandi.

**Arbeiðsbólkur:**
Í sáttmálaskeiðinum verður settur arbeiðsbólkur við 2 umboðum frá hvørjum parti at arbeiða við veitingartrygdini hjá SEV. Arbeiðsbólkurin skal gera eitt tilmæli um, hvussu ein arbeiðsskipan skal síggja út, tá ræður um veitingartrygdina hjá SEV, harundir, hvussu ein kann fyribyrgja havarí á el-skipanina o.a. líknandi, sum kann viðføra skaða uppá el-skipanina – og harvið møguliga eisini streymslit.
Miðið verður ímóti, at hetta arbeiðið verður liðugt áðrenn 1. oktober 2016.

Í Tórshavn 16. desember 2015

**Maskinmeistarafelagið** **Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**